# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 12. november 2009

### StÍF-VÍF 29-23 (17-11):

# StÍF kom á talvuna

**Við sigri á VÍF togaði StÍF seg upp um niðurflytingarstrikuna í Sunset-deildini**




Jákup Mørk

Støðan hjá StÍF var rættiliga greið undan dystinum. Eitt tap móti VÍF vildi meira ella minni isolera StÍF og VB í einum stríði um at sleppa undan niðurflytingini. Og tað var eitt scenario, sum ikki tóktist serliga hugagott á Skála.

Og tað er so heldur ikki aktuelt enn. Tað eydnaðist nevnliga hjá StÍF at vinna dystin, men fyrstu løtuna var tað tó VÍF, sum var betur koyrandi.

Seinastu tíggju minuttirnar undan steðginum leyp StÍF tó avstað. Tær vunnu hesa løtuna 9-1, og tað var eitt hál, sum VÍF ongan tíð vann aftur.

Hetta undirstrikar kanska eisini størsta veikleikan hjá unga VÍF-liðnum. Nevnliga at sveiggini í einstøku dystunum enn eru nakað stór. Og fyrst og fremst skal arbeiðast við hesum, nú tær skulu royna at halda fast um sína støðu á stigatalvuni.

## FAKTA

**StÍF-VÍF 29-23 (17-11)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 9-10
**40 min:** 23-17
**50 min:** 24-20
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 13(3), Adrianna Dobra 4, Rósa Danielsen 3, Soxanna Bodirlau 3, Bára Berthelsen 3, Anna Petersen 2, Fríðrun Danielsen 1
**VÍF:** Liljan Djurhuus 13(6), Tóra Seloy 5, Elisabeth Leo 2, Heidi Joensen 2, Agnas Olsen 1
**Brotskøst:** StÍF 3, VÍF 7
**Útvísingar:** StÍF 1, VÍF 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen




Kanón-tíðin úr Moskva varð betra við einum lítlum sekundi, men italski europameistarin, Federico Cobertaldo, setti nýtt World Cup-met, og so mátti Pál Joensen hesa ferð taka til takkar við silvurinum

# Pál betraði metið

**Við eini tíð upp á 14.32,59 kutaði Pál Joensen enn eitt petti av norðurlendska metinum, sum hann setti í Moskva, men hesa ferð rakk tað ikki til gullið**




Jákup Mørk

Hóast Pál Joensen hesa ferð mátti ásanna, at hann var ikki meira enn næstbestur, so var talan enn eina ferð um framúr avrik frá vágbinginum, tá hann svam 1.500 metrar í World Cup-stevnuni í Stockholm.

Federico Colbertaldo úr Italia vann gullið hesaferð, tá hann svam teinin upp á 14.28,35. Ein tíð, sum er betri enn níggju ára gamla metið hjá Grant Hackett.

Tíðin hjá Pál er tó framvegis í heimsflokki, og enn einaferð megnaði hann at halda danska Mads Glæsner aftanfyri seg. Glæsner og Pál hava verið mest sum konstantir kappingarneytar seinastu tvey árini, og hesa ferð kom danin á mál sum nummar trý við tíðini, 14.39,88.

### Máltindurin, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 71 (9) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 45 (9) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 42 (1) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 37 (7) |
| Liljan Durhuus | VÍF | 37 (13) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 35 (6) |
| Marinela Patru | Tjaldur | 27 (2) |
| Jacklin Durhuus | Neistin | 24 |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 24 |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 24 (5) |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 21 |
| Rakul Augustinussen | Neistin | 21 (6) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 19 |
| Una Olsen | Stjørnan | 18 |
| Bára Mortensen | VB | 18 |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Tjaldur | 6 | 6 | - | 0 | - | 0 | 190 | 136 | 54 | 12 |
| 2 Stjørnan | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 182 | 126 | 56 | 10 |
| 3 Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 156 | 137 | 19 | 8 |
| 4 StÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 110 | 149 | -39 | 2 |
| 5 VÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 133 | 177 | -44 | 2 |
| 6 VB | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 99 | 145 | -46 | 0 |